DAGSINS MEINING

Ein sømilig loysn

Tað man vera vanlig semja millum manna í ríkisfelagsskapinum, at tað sum hendi við Thulefólkinum, var ein ósømilig og ódemokratisk gerð. Sum kunnugt var upprunafólkið, sum í øldir hevði búð í Qanaq ella Thule tvangsflutt, fyri at USA skuldi kunna byggja risastóra herstøð á hesum staði. Eingin talaði at, eingin í danska ríkinum lyfti so mikið sum ein fingru fyri at koma hesum illa stadda upprunafólki til hjálpar.

Síðan hetta hendi, hevur Thulefólkið stríðst fyri at fáa bøtt um tann órætt, sum hesum fólki var fyri, tá tey vórðu rikin frá húsi og heimi til eitt øki, har lívskorini vóru munandi verri enn í Thule. Talan er um eitt veiðifólk, sum í stóran mun hevur varðveitt sína upprunamentan. Tey hava lagt søk sína inn fyri Hægstarætt, har tey taptu. Tey taptu, tí hesin ríkisins hægsti dómnstólur legið eina røða av formligum grundum fyri sín úrskurð. Dómurin tóktist Thulefólkinum órættvísur, og hava tey tí gjørt av at leggja teirra mál fyri europæiska mannarættindadómstólin í Strassbourgh. Hetta er seinasti møguleiki hjá Thulefólkinum at fáa sín rætt.

Tað er óhugsandi, at mannarættindadómstólurin fer at vísa málið frá sær. Tað er eisini væl hugsandi, at dómstólurin fer at ganga Thulefólkinum á møti. Hesin dómstólur hevur fleiri ferð gjørt úrskurðir, ið hava gingið europæiskum dómum í móti, eins og dómstólurin hevur havt at europæiskum stjórnum fyri brot á mannarættindi. Skuldi tað hent, at europæiski mannarættindadómstólurin fer at ganga Thulefólkinum á møti, verður hetta ein so dyggur moralskur smeitur fyri Danmark, at danska stjórin hevur einki val uttan at gera tað sama. Danmark má geva Thulemálinum eina smøliga loysn. Alt annað vildi verið ósømiligt fyri land, ið metir seg standa á odda fyri fólkaræði og mannarættindum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Skipað undirbrotligheit

Høgni Hoydal

Higartil hava allir flokkar verið samdir um, at bert Føroya fólk og Løgtingið kunnu gera av, hvussu Føroyar verða nýttar hernaðarliga. Í tveimum reglum hevur sambandssamgongan nú samtykt og góðkent, at Danmark tekur avgerðirnar vegna Føroyar í hernaðar- og verjumálum. Henda kúvending fer fram uttan nakra viðgerð. Uttan grundgeving. Uttan upplýsing um málið. Uttan fólkaræði yvirhøvur.

Í Føroyum er alt øvugt tá um fólkaræði ræður.

Tá ið vit føroyingar skulu taka ræðið í egnum landi, so skulu vit grundgeva og upplýsa og kanna - og vinnast skal á øllum hugsandi forðingum.

Men tá ið vit føroyingar skulu lata ræðið í hendurnar á øðrum, so kann tað gerast í tveimum reglum. Uttan grundgevingar. Uttan upplýsingar. Uttan kanningar. Uttan nakrar upplýsingar yvirhøvur.

Tá ið veruligt fólkaræði skal galda í hesum landi, so fer øll politiska skipanin, embætisverkið, løgfrøðingar og fjølmiðlar upp á bakbeinini. Krevja hvønn bøkk veltan, áðrenn nakað kann gerast yvirhøvur. Krevja hvørja hugsandi støðu allýsta - og øll eru á varðhaldi.

Men tá ið vit seta fólkaræðið til viks, so letur ikki í nøkrum. So rennur alt bara aftaná tí, sum nú einaferð hevur valdið.

Tá ið vit skulu gera okkara grundlóg, so er tað beinanvegin misteinkiligt og vit skulu hava fleiri ting at samtykkja og helst fleiri fólkaatkvøður.

Men tá ið onkur nevnir donsku grundlógina ella heimastýrislógina, so krevst ongin fólkaatkvøða. Tá er bara tað galdandi, sum føroyska fólkið ongantíð hevur góðkent - uttan spurnartekin, uttan kanningar, uttan upplýsingar, uttan grundgevingar.

Tá ið vit føroyingar skulu staðfesta, at vit hava rætt til at gera av alt í hesum landinum, so skulu vit hava breiðar semjur, og alt verður gjørt til tess at fáa allar flokkar við.

Men tá ið vit føroyingar skulu viðgera tað, sum er sett í gildi í Føroyum ímóti Løgtingsins vilja og uttan at fólkið er spurt, so krevst ongin breið semja. Tá er alt líka mikið.

Her valdar bert frumskógarlógin. Hetta er skipað undirbrotligheit.

Hernaðarmálið eitt skúladomi

Hetta er eisini kjarnin í hesum málinum um hernaðar- og verjumál.

Tað var Finnbogi Ísakson, sum fekk sett í verk eina kanning av støðu Føroya í hernaðarmálum. Kanningin váttaði alt tað, sum Tjóðveldisflokkurin hevur fert fram um hernaðarmálið, síðani flokkurin varð stovnaður. At Danmark hevði brúkt Føroyar beint ímóti øllum føroyskum ynskjum og samtyktum. At Føroyar vóru bumbumál. Og at skiftandi løgmenn høvdu verið drignir inn í málini, uttan at Løgtingið varð kunnað.

Nú hevði so verið lagað manni at gjørt upp við hesa undirbrotligu støðu. Men sambandssamgongan ger júst tað øvugta. Hon skjýtur upp, at vit skulu bara staðfesta, at Danmark kann gera sum tað vil, og at Løgmaður skal royna at kunna seg um, hvat Føroyar verða brúktar til. Altso júst sama støða, sum hernaðarkanningarnar hava avdúkað, hevur verið galdandi.

Kúvending við lít

Hetta er ein kúvending við lít. Tí higartil hevur alt Løgtingið verið samt um, at Føroyar skulu ikki brúkast sum ein finna í hernaðarpolitiskum talvi uttan at Løgtingið hevur góðkent tað. Og skulu vit gerast limir í einum millumtjóða felagsskapi og lata avgerðarrættin frá okkum, so skal Føroya fólk hava høvi til at taka støðu - antin á fólkaatkvøðu ella við at politisku flokkarnir viðgera málið væl og virðiliga og siga hvar teir standa, til dømis í einum valstríði.

Fyri góðum tveimum árum síðani samtykti eitt samt Løgting, at danskar hernaðarlógir skuldu setast úr gildi í Føroyum. Tað varð ikki gjørt. Men harvið staðfesti Løgtingið, at onki

Framhald á næstu síðu

Kommunur og ungdómur

NORRØNT SAMSTARV
Tíðindaskriv

Nú nærkast seinasta freist at tekna seg til vinarbýarstevnuni í Kalmar í Svoríki vikuskiftið 6. til 8.august í ár. Freistin er til 1.juni.

Evnini á vinarbýarstevnuni eru broytingar í kommunum og luturin hjá teimum ungu í vinarbýasamstarvinum.

Á skránni eru eisini víðkanin hjá ES, og hvussu hon ávirkar vinarbýasamstarvið, og góð dømi um vinarbýasamstarv í Norðurlondum verða tikin fram.

Føroyingar eru sjálvandi vælkomnir at vera við. Freistin at boða frá er til 1.juni. Luttøkan kostar 1.500 kr. umframt innivist og ferðina aftur og fram.

Umsóknarblað fæst hjá Norrøna Felagnum í Føroyum, J. Paturssonargøtu 24, 100 Tórshavn, tlf. 217999.

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Stjórnarrit 1 – Hvat er stjórnarskipan?

Stjórnarskipan Føroya. Nú fara formaður, næstformaður og skrivari í grundlógarnevndini undir greinarað, har teir gera viðmerkingar til kjakið um nýggja føroyska stjórnarskipan.

Greinarnar eru medvitað polemiskar. Teir leggja fyri við spurninginum um, hvat stjórnarskipan er

Formanskapurin í grundlógarnevndini
Jóan Pauli Joensen,
Kári á Rógvi,
Bárður Larsen

Nú geva fólk í øllum londum seg undir politiskar skipanir. Við hvørt verða tey kúgaði og noydd at viðurkenna ávíst stýri. Men í flestu føroum taka fólk undir við tí stýri, sum er, um enn tey vilja okkurt *øðrvísi* og politikarar ella fyrisiting hava framt mong misbrot og mistøk.

Í Føroyum hevur fólkið tikið undir við og virt landsins stýri í so langa tíð, at vit vita ikki rættiliga nær Føroyar eru skipaðar sum land - tað er sum politisk eind við egnum stovnum og lógum. Føroyska tjóðin kennir seg heima í Føroyum, knýtta saman í felagsskap og samleika. Føroyingar virða føroysku stjórnarskipanina - eisini tá mistøk verða gjørd.

Hvør er so stjórnarskipanin í Føroyum? Ikki er heilt lætt at svara hesum. Serliga kunnu føroyingar vera ósamdir um, hvør skipan okkara er við útlond, fyrst og fremst Danmark.

Í uppskotinum til nýggja samtykta stjórnarskipan fyri Føroyar hava vit roynt at sett orð á verandi skipan:

- Føroyar eru land
- Føroyingar eru fólk
- Føroyar eru við sáttmála knýttar í samveldi
- Føroyar kunnu taka seg úr ella geva seg í samveldi, tá fólkið vil tað

Vit eru í samveldi við Danmark og Grønlandi. Løgtingið hevur samtykt heimastýrsskipanina og hevur virkað eftir henni. Heimastýriskipanin er sum aðrar avtalur, ið lond gera sínamillum, soleiðis háttað, at hvør parturin hevur líka góðan rætt at tulka hana. Við nýggju stjórnarskipanini samtykkja føroyingar, at hetta er okkara fatan av støðuni.

Hetta er neyvan fjart frá støðuni hjá dønum heldur. Seinast danski forsætisráðharrin alment segði frá donsku støðuni, segði hann, at føroyingar kundu loysa frá Danmark og taka fullveldi, um teir vildu tað. Sjálvur ynskti hann tó, at føroyingar ikki fóru nakran veg stjórnarliga, men heldur valdu at tillaga verandi skipan. Eisini mangir føroyingar halda, at skipanin við Danmark er til fyrimuns fyri okkum, og at vit skulu halda fast við henda felagskap við danska ríkið. Men valla nakar føroyingur ivast í, at vit kunnu taka okkum burturúr, um og tá vit vilja tað.

Ein spurningur verður tí, hvussu vit vita, at føroyingar vilja taka seg burturúr samveldi sínum við Danmark. Uppskot okkara er, at vit samtykkja eina mannagongd, so ongin ivi skal vera.

Vit hava eina skipan til vit velja eina aðra

Onkur hevur hildið, at uppskotið hjá okkum at seta orð á føroysku stjórnarskipanina skal stríða ímóti heimastýrisskipanini ella tingskipanini ella øðrum reglum. Fyrr var illa.

Ein nýggj stjórnarskipan vil altíð onkursvegna verða øðrvísi enn tann, ið er frammanundan, annars er eingin orsøk til broyting. Tingskipanin má sjálvsagt víkja fyri nýggjari - og hægri - stjórnarskipan, og má rættast til, eftir at trúgv, var hetta klárt í stríði við galdandi skipan og kundi kanska av eini løgtingsskrivstovu, um hon hevði verið til, verið víst burtur. Sama var, tá tingið, helst við ringum tannabiti, samtykti at virða norska kongin. Eisini tá kongur í síni tíð tók sær einaveldi og noyddi hampafólk at svørja sær trygdareið, var hetta brandólógligt. Einaveldiskongur setti í gildi kongalógina sum grundlóg. Kongalógin sigur seg at galda ævigt. Longu av teirri orsøk skuldu bæði norska og danska grundlógin verið vístar burtur sum ólógligar og stríðandi móti tí ævigt galdandi kongalógini. Og tó eru tær samtyktar og frammi hvønn dag.

Heimastýrisskipanin er, hugsað á henda hátt, eisini millum herviligastu lógarbrót. Danska ríkisgrundlógin sigur kong at hava vald at skriva út val, staðfesta lógir og velja landsins stjórn. Hon sigur danska ríkistingið eiga vald at samtykkja lógir, áleggja skatt og játta pengar. Men hóast tað, ja so legði heimastýrisskipanin, ið fyrst føroyingar, síðani danir samtyktu, allar hesar heimildir til føroyskar myndugleikar. Grundleggjandi ólógligt! Ella?

Tá danir tó í 1953 smíðaðu og samtyktu nýggja ríkisgrundlóg, søgdu tey lærdu og lógkønu í áliti sínum, at heimastýrisskipanin mátti metast at vera í samsvari við ríkisgrundlógina, tí annars var hon jú ikki sett í gildi.

Sama siga vit. Tá vit hava samtykt hesa stjórnarskipan, og hon ótarnað verður vird og brúkt, so má hon metast at vera í samsvari við verandi skipan - ella at hava broytt verandi skipan.

Í øllum føroum eiga vit rættin at siga, hvat vit halda er sambærligt við heimastýrisskipanina. Eftir okkara bestu meting fara danir ikki at móttmæla uppskoti okkara, heldur fara teir at erpa sær úti í víðu verð av, hvussu rúmsátt er í danska ríkinum. Men skuldi danska stjórnin fingið rukkur á pannuleðrið, so er greið mannagongd avrádd í sjálvari heimastýrisskipanini, hvussu ósemjur um tulkingar skulu loysast. Vit kunnu tó ikki taka ta sorgina í forskoti, og enn er henda manngongd ongantíð brúkt, tí danir velja altíð at siga, at tað, sum sett er í gildi, man vera í lagi.

Føroyingar allir mugu taka støðu til, um teir taka undir við uppskotinum um Stjórnarskipan Føroya, tað - og bara tað - ger av, um hon fær gildi.

Ríkið hongur í hjallinum

Vit vilja hervið nýta høvið at takka Kaj Leo Johannesen fyri lesarabrævið »Ríkisfelagskapurin tryggjar føroyingum í Danmark skerpikjøt«.

Vit halda hetta vera eitt ótrúliga gott grundarlag fyri at verða verandi í danska ríkinum og eru nú sannført um, at ríkisfelagskapurin er heimsins besta skipan.

Frøast eisini um tað avbera góða arbeiði, ið formaður Sambandsflokksins ger fyri okkara land. Tað er gott at seta sær høg mál! Næsta verður kanska tvøstið?

Enn einaferð takk Kaj Leo!

Ung og lesandi í Íslandi:
Sunneva Háberg Eysturstein,
Guðrið Hansen,
Sanna Andrassardóttir Dahl,
Herfinnur Árnafjall,
Gunnhild Dahl Niclasen,
Mads Jacobsen,
Lív Patursson.

Framhald av síðu 10

kann setast í gildi í Føroyum á henda hátt uttanum Løgtingið.

Fyri einum góðum ári síðani, samtykti ein stórur meirihluti í Løgtinginum, at Føroyar skuldu ikki dragast inn í eitt kríggj uttan so, at ST hevði góðkent tað.

Harvið staðfesti Løgtingið aftur, at sjálvandi hevur Løgtingið rætt til at gera av, hvussu Føroyar verða brúktar og at siga, hvør kann taka avgerðir vegna føroyingar í hernaðar- og verjumálum.

Minnulutauppskotið er greitt

Og nú skjýtur ein minniluti í uttanlandsnevndini upp at gera akkurát tað sama. At staðfesta, at vit skulu hava fult innlit í og fullan avgerðarrætt í verju og trygdarmálum.

Men ein meirihluti sigur nei - uttan nakra grundgeving. Uttan nakra upplýsing. Uttan enntá at kanna, hvat tað ber í sær, um uppskotið hjá meirilutanum verður samtykt.

Meirilutin sigur, at nú skulu vit bara góðtaka støðuna sum hevur verið. At Danmark tekur hesar avgerðir vegna Føroyar og hevur rætt til at gera tað.

Og so skulu vit bert royna at fáa innlit í, hvussu vit nú verða brúkt í hernaðar- og verjupolitiskum samanhangi.

Hetta verður eitt risa-afturstig fyri føroyskt sjálvræði.

Hetta verður eitt risa-afturstig fyri ta breiðu semju og ta greiðu støðu, ið allir flokkar í Føroyum hava havt til hernaðar- og verjumál.

Hetta er eitt risa-afturstig fyri føroyskt fólkaræði.

Vit góðtaka nú bara alt, sum er farið fram. Og sum er so væl lýst í tveimum frágreiðingum. At Føroyar hava verið brúktar beint ímóti tí, sum Løgtingið hevur ynskt.

Fólkaræðið fokið

Tað einasta andstøðan hevur kravt, er, at vit heldur staðfesta, at sjálvandi kann onki gerast uttanum Løgtingið.

Men samgongan vil ikki hava tann avgerandi setningin við. Hon sigur, at tað er at provokera og søkja konfrontasjón við danir.

Um vit høvdu gjørt tað sama, tá vit bardust fyri føroyska málinum - bara sagt, at donsk lóggáva forðaði okkum at vinna málstríðið - ja, so høvdu vit onki føroyskt mál í dag.

Um vit høvdu gjørt tað sama, tá undirgrundarmálið leikaði í 50 ár - ja, so høvdu vit kanska í dag kunnað sitið við borðið og roynt at fingið innlit í, hvat føroyska undirgrundin varð brúkt til.

Um vit høvdu gjørt tað sama, tá Danmark fór inn í ES - bara at góðkenna støðuna sum hon sá út tá, ja, so vóru vit limir í ES í dag.

Vit skulu ongantíð góðtaka, at tað eru aðrir enn føroyskir myndugleikar, ið taka støðu til føroysk hernaðar- og verjumál.

Hetta er valið millum at reka sjálvstýrispolitikk ella at tillaga okkum ta støðuna, har danskir myndugleikar hava tikið avgerðirnar fyri okkum - hóast óteljandi mótmæli frá Løgtinginum. Og har Føroya fólk aldri hevur havt eitt líkinda høvi at siga sína hugsan ella at taka støðu.

Um vit spurdu Føroya fólk á fólkaatkvøðu - hvør skal taka støðu og avgerðir vegna Føroyar í hernaðar og trygdarmálum - Føroyar ella Danmark? Hvat hevði svarið so verið?

Ariel

66 týðingar

TÍÐINDABRÆV
frá Mentunargrunni Studentafelagsins

Alexandur Kristiansen er av fremstu týðarum í føroyskum skaldskapi yvirhøvur, og tað er ikki smávegis hann hevur flutt av altjóða skaldskapi yvir í okkara mál. Sum ikki einaferð fevnir hann víða og týðir líka frá klassiskum grikskum høvundum um William Shakespeare til eina drúgva yrking eftir russarin Alexander Blok. Hesa seinastu hevur týðarin ognað Jóanesi Nielsen á fimmti ára degnum. Av tí grikska er okkurt týtt frammanundan av Janusi Djurhuus, men Alexandur roynir, um tað ikki vignast betri hjá honum. Og so er tann gitna sonettin hjá Patrarca til Lauru við í hópinum – kanska tí at føroyski yrkjarin áður hevur sagt seg vera raktan av sonettfepuri.

Eisini Goethe, William Blake, John Keats og so okkara egni William við eftirnavninum Heinesen sleppa upp í part. Av skaldum á lívi kunnu nevnast Octavio Paz, Lars Forsell, Seamus Heany og Henrik Nordbrandt.

Alexandur Kristiansen er ómetaliga kringur í sínum royndum at flyta alheimsskaldskap yvir í føroyskt og á henda hátt tekur hann um endan eftir Janus Djurhuus, sum vildi prógva, at føroyskt var eitt mentamál millum onnur.

»Ariel« er løgd til rættis og prentað á Hestprent. Hon er 111 síður til longdar og kostar kr. 120. Mentunargrunnur Studentafelagsins gav út.